# Stórur spenningur um Marjunbrunn



*Tá løgmaður og oljumálaráðharrin vitjaðu á Sovereign Explorer fyrr í summar, og borað varð fyri Statoil. Her saman við einum av Statoilmonnunum*

*Mynd Eirikur*

**OLJULEITING**

*Jan Müller*

Tað hevur gingið væl at bora hjá Amerada Hess-samtakinum, síðani Sovereign Explorer setti borin í 20. september ella fyri umleið hálvum øðrum mánað síðani. Eftir øllum at døma verður nú borað í sjálvum málinum, ið miðjað varð eftir at raka á umleið 4000 metra dýpi. Tað er ómøguligt at fáa nakað váttað ella avsannað um møguligt fund, men Sosialurin veit frá vælvitandi keldum, at Amerada Hess hevur rakt við »okkurt« í undirgrundini. Spurningurin er bara, hvat hetta »okkurt« er. Sum skilst kann ganga báðar vegir. Tvs. at her kann verða olja ella gasskondensat ella hvørki. Spurningurin tá er, hvat útsløgini merkja.

Ben Arabo, stjóri hjá AmeradaHess hevur valt at hava tunguna mitt í munninum. Hann vil rætt og slætt einki siga. Annað enn at tað hevur gingið sum ætlað, og at teir koma at brúka tveir mánaðir til boringina sum upprunaliga ætlað. Tvs. at boring og logging verður alt liðugt um hálvan november.

Tað skilst, at boringin hevur ligið still í nakrar dagar í tí ringa veðrinum, men at tað hevur verið loggað tvs. at mátitól eru koyrd niður í holið. Uttan iva eru tað hesi mátitólini, sum nú skulu til at kanna, hvat er í brunninum ella um nakað er av áhuga.

Sosialurin veit, at vónirnar at finna okkurt áhugavert longur uppi í brunninum hildu ikki. Onkur smávegis oljuspor hava helst verið men heldur ikki meira enn tað. Nú verður so alt álit sett til høvuðsmálið í dýpinum, og komandi dagar fara at vísa, um Amerada Hess, Dong, British Gas og Atlants Kolvetni hava funnið olju ella gass í Marjunbrunninum. Sum støðan er í løtuni bendir okkurt á, at tað kann ganga báðar vegir.

-Eg eri sera spentur um hesa boringina sigur Eyðun Elttør í eini viðmerking. Hann fylgir væl við, hvat hendir. Hann vónar, at eitt fund verður gjørt nú. Vit eiga at tola at fáa boðini, at eingin olja er, og at olja er. Vit hava fyrireikað okkum í langa tíð, og tí eiga vit eisini at taka ímóti tí avbjóðingini.


## Føroya Tele í Suðuroy søkir eftir fólki

"Tað er góðskan av tínum arbeiði, sum vil gleða Guð — ikki nøgdin"

Mahatma Gandhi



Til okkara deild í Suðuroynni verður søkt eftir fólki at byrja skjótast til ber.

Á Føroya Tele í Suðuroy starvast falt 9 fólk. Nýggja fólkið skal saman við øðrum starvsfólkum á deildini vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum.

- Skráseting av kaðalneti
- Telefon og kunda avgreiðslu
- Vøru og goymslustýring
- Telebúðar avgreiðsla
- Aðrar uppgávur eftir tørvi.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv í mennandi og avbjóðandi umhvørvi, við góðum arbeiðsumstøðum

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tekniskur assistentur ella líknandi viðkomandi útbúgving.
Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir við EDV á brúkarastøði.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele á Tvøroyri.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, økisleiðara tel. 371000 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2001

**Umsóknir skulu sendast til**
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*